Rodmundur Nielsen, borgarstjóri:




*Eystanstevnan telist millum tær størru summarstevnurnar*

# Vit leggja vanliga gerandisdagin til síðis á stevnuni

**– Saman við ítróttarfeløgum, áhugabólkum og samkomum hava vit gjørt karmarnar um stevnuna so góðar sum gjørligt, og vit vóna, at undirtøkan verður góð, sigur borgarstjórin, sum bjóðar øllum vælkomnum á Eystanstevnu**

EYSTANSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Borgarstjórin í Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen, bjóðar vegna býráðið øllum – bæði nær og fjar, ungum og eldri – hjartaliga vælkomnum á Eystanstevnu, sum verður hetta vikuskiftið.

– Hetta er ein av teimum týðandi summarstevnunum, har kappróður og aðrar ítróttargreinir hava stóran týdning fyri ítróttarfeløgini.

Hann vísir á, at nógv er hent á flestu økjum seinastu árini, og stórur spenningur er um gongdina í ymisku ítróttargreinunum, sum kappast verður í, nú vit hava sett skjøtil á summarið.

**Gaman og álvari**

– Í ár eru 44 ár liðin, síðan fyrsta Eystanstevnan varð hildin, og vit kunnu ikki siga annað enn, at nógv er broytt hesi árini, men týdningurin av at halda summarstevnur er eins stórur nú sum áður.

Borgarstjórin vísir á, at hetta er vikuskiftið, tá ið flestu ítróttarfólk í Føroyum møtast til dystar í tjóðarítrótt okkara – kappróðri – eins og í øðrum ítróttargreinum.

– Hetta er vikuskiftið, har vit leggja vanliga gerandisdagin til viks eitt bil og taka lut í ymisku og fjøltáttaðu tiltøkunum, sum eru til gaman og álvara hesar dagarnar.

**Vælkomin!**

Rodmundur Nielsen sigur, at býráðið saman við ítróttarfeløgum, áhugabólkum og samkomum hevur gjørt karmarnar um stevnuna so góðar sum gjørligt.

– Vit vóna tískil, at undirtøkan verður góð, soleiðis at Eystanstevnan 2005 verður væleydnað.

Vegna Runavíkar býráð bjóðar borgarstjórin øllum at vera hjartaliga vælkomnum á Eystanstevnu.



*- Eystanstevnan hevur nú 44 ár á baki, og nógv er hent hesi árini, sigur borgarstjórin í Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Nógv er á skránn

**Skráin fyri Eystanstevnuna í ár er ikki lítil, men rættiliga rúgvusmikil. Nógv arbeiði og stór fyrireiking liggur aftanfyri øll tey mongu tiltøk, sum eru á skránni**

EYSTANSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Skráin fyri stevnuna byrjaði longu týsdagin í hesi vikuni, tá ið Roysnið skipaði fyri grand-prix renning fyri vaksnum í Runavíkarøkinum, og hósdagin varð fyrsta framsýning av Eystanstevnukabarettini í Glyvra skúla.

Í dag, fríggjadagin, byrjar skráin við, at Sjókaféin í Runavík letur upp klokkan 9, og somuleiðis hava allir handlar í Handilsmiðdeplinum opið frá klokkan 10 til 23. Matstovan, Casa Blanca, sum eisini er nevnd í skránni fyri stevnuna, læt upp í morgun klokkan 11.30 og verður opin til klokkan 23.

Aftur í kvøld skipar Roysnið fyri grand-prix renning, og hesaferð er renningin fyri børnum.

Klokkan 18 í kvøld er fótbóltsdystur á skránni fyri børum undir skúlaaldur, og ein tíma seinni spæla dreingir hjá NSÍ og B36.

Tivoli letur eisini upp í kvøld, og barnaundirhald verður við Trøllapæturi, Ommuni, Jógvani og Erlingi á stevnuøkinum. Go-kart, el-bilar og barnadiskotek er eisini til børnini.

Í kvøld er eisini listaframsýning í býráðshøllini, ungdómsgudstænasta í Glyvra kirkju og Eystanstevnukabarett. Av øðrum tiltøkum í kvøld er stóra gospel-konsertin í Ítróttarhøllini í Runavík og opið hús í Missións- og ungdómshúsinum.

Á midnátt verður diskotek í Støkkhøllini.

Leygardagin eru fleiri fótbóltsdystir á skránni, og mest spennandi dysturin verður ivaleyst landskappingar- og steypadysturin millum NSÍ og TB í 1. deild, sum verður klokkan 17.

Klokkan 13.45 leygardagin verður skrúðgonga frá Glyvra skúla og út á stevnuøkið, har Kári Thorsteinsson setir Eystanstevnuna og Nes sóknar Musikkfelag spælir og Kór Glyvra kirkju syngur.

Kappsigling verður eisini leygardagin, og her er tað Seglið, sum skipar fyri.

Støkk skipar fyri fimleikaframsýning í Ítróttarhøllini.

Klokkan 16 leygardagin syngur Brandur Enni á stevnuøkinum, og kokkan 21.30 syngja Niels Midjord og Petur Jacob Eliassen.

Keldan í Skálafirði verður eisini á stevnuøkinum leygarkvøldið.

Á midnátt verður midnáttarsamkoma, har kórið hjá Jóhan Mortensen syngur og Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, heldur røðu.

Leygarkvøldið spæla Terji Rasmussen Band til dans í Ítróttarhøllini, og West og Blues spæla til gamlamannadans í Støkkhøllini.



Sunnudagin verða eisini fleiri áhugaverd tiltøk á skránni, og lagt verður fyri við gudstænastu í Glyvra kirkju við Martin R. Jacobsen, presti.

Fleiri av teimum tiltøkum, sum eru á skránni leygardagin, verða uppaftur-

Eystanstevnan:

# Eingin FM-kappróður, men

**Venjingarumstøðurnar hjá róðrarfólki og øðrum, sum ynskja at leiga hølir og venjingarambоð, eru betraðar við nýggjum venjingarhøli í Róðrarneystinum á Glyvrum**

EYSTANSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í ár verður eingin FM-kappróður á Eystanstevnu, tí ár er tað kappróðurin á Varmakeldu, sum telir við á stigatalvuni. FM-róður er nevniliga annaðhvørt ár á Eystanstevnu og annaðhvørt ár á Varmakeldu.

Men hóast róðurin ikki telir við í FM-høpi hesaferð, verður kortini róð kapp á Skálafjørðinum í ár.

Kappróðurin á Eystanstevnu byrjar sunnudagin klokkan 15, og Kappróðrarfelagið hjá NSÍ vónar, at undirtøkan verður góð, bæði viðvíkjandi tilmelding av bátum og vitjandi á havnalagnum, meðan róð

## Ferðslubroytingar á Eystanstevnu

EYSTANSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Longu frá mikukvøldinum í hesi vikuni til sunnukvøldið klokkan 23 verður eingin gjøgnumkoyring á stevnuøkinum í Runavíkar kommunu.

Heiðavegurin verður sostatt stongdur frá Jungmann og suður til Hotel Runavík. Ferðslan, sum plagar at koyra eftir hesum vegastrekki, verður í staðin beind eftir kaiøkinum. Tó ber til at koyra til handlarnar, sum liggja ímillum Føroya Banka og Brotið, siga tey, sum skipa fyri á Eystanstevnu.